# Kunning av stovnsleiðarum um tíðarfreistir o.tíl.

Góði stovnsleiðari,

Nú ið 2022 skjótt er farið aftur um bak, ynskir gjaldstovan at kunna teg um, hvussu vit kunna um tíðarfreistir o.a. í sambandi við ársskiftið.

Brúktir verða 3 miðlar í sambandi við kunning: teldubrøv til tín, tíðindir á FSL-portalinum og á www.gjaldstovan.fo – umframt at ymsi kunningarskriv o.a. eru á www.gjaldstovan.fo. Sí leinkini ”ársroknskapurin 2022” og ”roknskapargóðkenning”, sum tú eigur at kunna teg við.

Undir leinkinum ”ársroknskapurin 2022” sært tú leinkið ”Listi yvir FSL-mánaðarkoyringar Jan. – Des. 2023”, har kunnað er um, nær ið tíðarskeið verða latin aftur og roknskaparútskriftir í telduposti sendar út. Sambært yvirlitinum er 21. februar 2023 síðsti dagur, ið stovnarnir kunnu skráseta á fíggjarárið 2022 – síðsta lønarkoyring viðvíkjandi fíggjarárinum 2022 verður helst nakrar dagar undan hesum.

Gjaldstovan fer so hvørt at kunna um, at tíðarskeið verða latin aftur – herímillum eisini um, at síðsta freist at bóka á fíggjarárið 2022 nærkast.

g.v.

Gjaldstovan